## Playstation til granskarar



Nýggju Playstation 3 frá Sony eru somikið kraftmiklar, at tær nú eisini verða nýttar av granskarum. Soleiðis hava lærdu háskúlararnir í Aalborg og Keypmannahavn júst útvega sær 30 Playstation hvør. Tær skulu tó ikki nýtast til spæl, men við at seta 30 av hesum saman fæst datamegin somikið langt upp, at talan í veruleikanum er um superteldur. Slík clusters av Playstations verða longu nýtt í USA, og er hetta ein loysn, sum er væl bíligari enn samkoyring av fleiri vanligum teldum.

## Heimsins dýrasti Rolls

Elsti Rolls Royce-bilurin, sum framvegis koyrir, varð herfyri seldur á uppboðssølu. Talan er um ein lítlan bil við tveimum setrum og 10 hestakreftum, og er hann bygdur í 1904. Undan uppboðssøluni á Bonhams í London varð bilurin virðismettur til knappar 20 mió kr., men søluprísurin gjørdist tó nógv hægri. Ikki minni enn £3,5 mió var hægsta boðið. Hetta svarar til 36,8 mió kr. Rolls Royce varð stovnað í 1904, og er hetta einasti bilurin, sum enn er eftir av teimum, sum vórðu framleiddir hetta árið.

# Handilsmiðstøð skotin út í

**Óli Marner Christiansen og Niels Mortensen kappast um Klaksvíkina, og í løtuni er líkt til, at tað verður SMS-maðurin, sum vinnur slagið – og Óli Marner noyðist at leggja "kongin"**

HANDILSLÍV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Handilsverðin er hørð, og hon kann eisini vera køld, serliga tá ið ræður um kappingina um tær stóru verkætlaninar. Soleiðis er eisini við ætlanini, sum Óli Marner Christiansen leingi hevur arbeitt við í Klaksvík, nevniliga at byggja eina handilsmiðstøð á stóra og planeraða økinum, sum Klaksvíkar kommuna hevur lagt út til endamálið innast á vánni. Hetta er tilfar, sum komið er úr Norðoyatunlinum, og økið hevur leingi ligið klárt til byggingar.

Enn liggur økið órørt, og einki er bygt.

Í samrøðu við Sosialin fyrr í heyst segði Óli Marner Christiansen, sum enn ræður yvir økinum, hóast tíðin hjá Klaksvíkar kommu er farin, at ætlaninar at byggja handilsmiðstøðina ikki eru sleptar.

– Vit høvdu ikki havt brúkt so nógvan pening upp á hesa verkætlan, um vit ikki meintu nakað við tað. Gongd er í málinum, og vit vilja bara vissa okkum, at alt konseptið er tað skilabesta og burðardyggasta – bæði nú og frameftir, áðrenn farið verður í gongd við sjálva byggingina, segði Óli Marner Christiansen.

Í samrøðu í blaðnum í dag er hann ikki so bjartskygdur longur (lesið greinina til høgru).

### Niels fyrireikar

Trupulleikin hjá Óla Marneri er, at mikli forrætningsmaðurin í SMS, Niels Mortensen, eigur tveir stórar bygningar á Borðoyavík, sum hann á sinni keypti frá strandinginum, Eivindi Jacobsen.

Tað í sær sjálvum nýtist ikki at vera nakar trupulleiki, men spurningurin er, hvat Niels Mortensen fer at brúka hesar bygningarnar til. Einki forðar SMS-manninum í at fara undir handilsvirksemi í bygningunum, og rættiligta álítandi keldur vilja vera við, at tað er júst hetta, sum hann arbeiðir við.

Í løtuni verða tekningar gjørdar, og sum skilst, verður Bónus ein av handlunum á Borðoyavík.

At tekningar nú verða – ella longu eru – gjørdar, váttar Niels sjálvur fyri Sosialinum.

Ein trupulleiki hjá Nielsi er, at hann eingi parkeringspláss eigur rundan um bygningarnar á Borðoyavík, men tað er heldur eingin trupulleiki hjá einum royndum forrætningsmanni, sum honum. Í Klaksvík vænta tey, at Niels fer at taka annan bygningin niður og brúka hann til parkeringspláss – og síðan er hin eftir.

### Einki samband

Hugsandi er eisini, at Niels fer at taka væl etableraðar handlar, sum í dag eru í SMS, við sær norður til Klaksvíkar, og tað er júst hetta, sum er tann stóri trupulleikin hjá Óla Marneri og ætlaðu handilsmiðstøðini í Klaksvík.

Kortini vil Óli Marner í hinari greinini á síðuni ikki viðganga, at so er.

– Eg eri glaður fyri kapping – og kapping skapar framdrift, sigur hann.

Tá ið Sosialurin tosaði við Óla Marner fyrr í heyst, skiltist, at eitt samstarv millum hann og Niels Mortensen var upp á tal, men nú er greitt, at einki samband hevur verið millum partarnar leingi, tí Niels Mortensen heldur, at byggingin av handilsmiðstøðini og konseptið í Klaksvík í síni heild er ov kompliserað.

Báðir vátta, at einki samband hevur verið millum partarnar í longri tíð.

Ætlaða handilsmiðstøðin



*Í løtuni er ógvuliga ivasamt, hvat verður av handilsmiðstøðini hjá Óli Marner Christiansen. Niels Mortensen eigur tveir bygningar á Borðoyavík, og nú er hann í holt við at gera tekningar yvir, hvussu handilsvirksemið skal innrættast. Spurningurin er so, nær Klaksvíkar kommuna fær sítt ætlaða miðbýar-og mentanarumvhørvi á "sandinum" í Klaksvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

dregur út, og SMS-maðurin hevur ikki hug at bíða, nú hann eigur nevndu bygningar.

Enn hevur Niels ikki søkt Klaksvíkar kommunu um nakað, men væntandi er, at hann fer at lata hoyra frá sær, tá ið konseptið á Borðoyavík er kárt at seta í verk.

Kommunan fer neyvan at forða Nielsi í at byggja sína handilsmiðstøð, tí tað er sum so einki, sum forðar honum í at reisa eina slíka verkætlan á føtur á Borðoyarvík.

Tað váttar Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, eisini fyri Sosialinum.

### Kommunan ótolnast

Klaksvíkar kommuna tekur av fullum huga undir við ætlaðu handilsmiðstøðini hjá Óla Marneri í Klaksvík, og í samrøðu við Sosialin fyrr í heyst segði borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen, at kommunan helst vildi sæð, at okkurt spurdist burtur úr verkætlanini skjótast gjørligt.

Fer Niels Mortensen at byggja sína handilsmiðstøð á Borðoyavík, tekur hendan grundarlagið undan ætlaðu handilsmiðstøðini í Klaksvík – í hvussu er fyribils, og spurningurin er tá, hvør verður sinnaður at fíggja verkætlanina, sum Óli Marner Christiansen longu nú hevur brúkt nógvan pening upp á.

Í Klaksvík siga tey, at Óli Marner er skilamaður. Hann er av fittastu monnum, og er eitt gott menniskja, men spurningurin er, um hann ikki longu er ov seinur á sjóvarfallinum.

Trupulleikin hjá Klaksvíkar kommunu kann gerast, at ætlaði miðdepilin í Klaksvík dettur niður fyri ella verður skotin út í framtíðina.

### Aðrir møguleikar

Ein annar møguleiki er, at tað verður Niels Mortensen, sum yvirtekur verkætlanina við handilsmiðdeplinum, og tá fær Klaksvíkin ein